tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Loftmiðlar á fíggjarlóg

## *Oddagrein*

NÚ roknskapurin hjá Sjónvarpinum aftur er komin fyri tingið, tí stovnurin hevur havt hall í 1999, og neyðugt tí er við eykajáttan, so er eisini gjørt eitt upprit, sum lýsir støðuna og framtíðina hjá báðum loftmiðlunum.

UPPRITIÐ hevur Mentamála- og Undirvísingarmálastýrið gjørt og snýr seg serstakliga um framtíðar støðuna hjá Sjónvarpinum. Víst verður m.a. á, at neyðugt er við at seta av á fíggjarlógini umleið 5 mill. kr. til Sjónvarpið um árið, nú inntøkurnar frá spæli og síggjaragjaldi ikki røkka til. Eisini verður víst á tørvin at gera nýggjar íløgur í sjónvarpið til tess at kunna liva upp til tær avbjóðingar, sum eru frammi í tíðini tøkniliga sæð. Útgerðin, sum SVF í dag hevur, er eisini í mongum førum við at vera ótíðarhóskandi. Eisini verður í uppritinum mælt til, at útvarpið kemur á fíggjarlógina so ella so.

VIT kunnu so spyrja, hvussu slík broyting í peningaligu viðurskiftunum hjá stovnunum fer at ávirka teirra støðu í samfelagnum sum óheftur fjølmiðil. Tað hevur uppritið so eisini viðgjørt og leggur stóran dent á at hava vatntøtt skott millum játtandi myndugleikarnar og stovnarnar, soleiðis at skilja, at tann jounalistiska viðgerðin og útveljingin er óheft av skiftandi almennum myndugleikum og leiðslum.

HIGARTIL hevur gongdin verið tann, at eitt nú ein stovnur sum Útvarp Føroya hevur kunnað virkað púra óheft av stýrandi myndugleikunum. Ein nevnd vald av løgtinginum hevur verið hægsti myndugleiki, tá umræður programval ol. Nú bendir so á, at hetta er við at broytast, soleiðis at útvarpið sum stovnur kemur at liggja beinleiðis undir Fíggjarmálastýrinum, og hetta kann vera sera óheppið fyri stovnin, tá hugsað verður um, at hann nú vil vera meira bundin at einum ávísum politiskum myndugleika, sum tá hevur møguleika at ávirka virksemi hjá stovninum. Vit mugu gera okkum greitt, at hóast loftmiðlarnir eru tveir almennir stovnar, so eru teir kortini heilt øðrvísi enn aðrir almennir stovnar m.a. út frá tí, at teir eisini skulu kunna hava eftirlit við øllum teimum avgerðum, sum verða tiknar á politiskum stigi.

VIT hava áður víst á, at loftmiðlarnir eru so týðandi mentanarstovnar, at teir mugu fáa pengar á fíggjarlógini. Tað meina vit framvegis. Men tað má vera gjørt við skili, soleiðis at politikararnir harvið ikki fáa ávirkan á tað journalistiska.

***Sosialurin***

## Lesarabrøv:

# Hatta var so annað umfar

So komu tey heim aftur frá hesum samráðingarumfari, landsstýrisumboð og embætismenn, men úrslitið, hvussu við tí?

Jú, tey siga seg vera nøgd, summi tó við eitt sindur ivandi smíli og spakari rødd. Men eftir almennu tíðindunum at døma, so er onki nýtt komið fram, sum tey ikki høvdu hoyrt frammanundan herheima, og tí kunnu vit í andstøðuni undrast yvir, hví tey fyrst gjørdust so bilsin á fyrsta umfari í marts mánaði, og so aftur bilsin hesu ferð.



**Fyrireikingarnar og fyrra umfar**
Kynstrið at venda øllum við, viðgera mál uppeftir og niðureftir og aftur og fram, og at burturforklára, dugir Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sum ongin annar, og soleiðis hepnast tað honum ofta at benda kjakið aðrar vegir, so tann, ið hevur hug at spyrja, hevur gloymt hvat hann veruliga hevði hug at spyrja um.

Men vit mugu fyri alt í verðini ikki gloyma, at landsstýrið, umboðað av **øllum trimum flokkum**, fór til Danmarkar eftir einum **fullveldi.**

Tað sum tey vildu hava, var, at saman við fullveldinum skuldu tey eisini hava bæði uppí posa og sekk. Vit skuldu hava danskan pening, sum vit skuldu liva væl av, so vælferðin ikki lækkaði, og annars fór alt annað bara at halda fram sum higartil, og tey rættindi sum vit vildu varðveita, tey fóru vit sjálvandi at varðveita. Tað hevði Høgni Hoydal fortalt Annfinni Kallsberg og Helenu Dam á Neystabø, og so fór tað at verða so. **Søgdu tey!!.**

At vit í andstøðuni høvdu dittað okkum at kalla samráðingaruppleggið óveruligt og dreymakent, varð avvíst og skírt sum ræðumyndir, sum vit blakaðu í høvdið á hinum, at grava skotgravir o. a. m., fyri ikki at tala um undirbrotligheit. Men okkara viðmerkingar vóru tær, at eitt mark fór at vera fyri, hvat danir fóru at góðtaka, tá teir hoyrdu um føroysku fullveldisætlanir, ið **teir** skuldu gjalda, soleingi **vit** vildu hava tað.

Viðmerkingar løgmans, tá tey komu heimaftur, vóru: ”Vit vóru ov góðtrúnir”. At júst hann, Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal, viss í trúnni og við einum yvirberandi smíli áðrenn samráðingarnar søgdu : ”Vit eru væl fyrireikaði, vit hava gjørt eitt gott forarbeiði, og nú eru tað **vit**, sum seta dagsskránna” tað var minni tosað um.

**Annað umfar**
Hesu ferð gekk alt so avbera væl, sigur løgmaður, tí hesu ferð sluppu tey at siga nakað!!!

Men, tá tey verða spurd nærri, eru ”signalini” eitt sindur ymisk Tá løgmaður nærmast umberandi sigur, at samráðingar ikki rættiliga eru byrjaðar enn, so leggur landsstýrismaðurin í sjálvsstýrismálum tað fram nærmast sum vunnin rættindi, og ”rættindi er ikki bara nakað sum man fær – men nakað sum man vinnur” sambært Høgna Hoydal í sendingini **Krosskast**. Hann kundi líka so væl lagt aftrat ”og sum man kann spæla sær av hondum”, tí tað er tað, sum Høgni Hoydal er í ferð við at gera. Og Helena Dam á Neystabø er farin at bakka og tosar nú um ”at tað má taka ta tíð, tað tekur.

Men tað, sum vit hoyrdu danska statsministarin siga var, ”vi er enige om, at vi kun er enige, når vi er enige om det hele”, og tað er so uppaftur nakað annað!

**Okkara mál.**
Okkara mál má vera, at vit als onga skiftistíð skulu hava. Vit skulu gloyma alt um skiftistíð. Sjálvsstýrið í Føroyum skulu vit sjálvi menna í samráð við hin partin av ríkinum, **og** vit skulu gjalda fyri tað sum vit yvirtaka, **og** vit skulu yvirtaka tað, vit kunnu og orka, **og** vit skulu verja vælferðina í Føroyum.

Orðingin hjá Høgna Hoydal **Evsta Vald,** sum hann hevur stjórnað landsstýrinum at syngja í einraddaðum kóri seinastu tvey árini, er agnið sum sær dragandi út, men sum vit mugu ávara øll móti at svølgja.

**Lisbeth L. Petersen,**
**Sambandsflokkurin**

# Ein lítil heilsan til Jóanes Eidesgaard

*formann Føroya Javnaðarfloks*

Í kjakinum um tað føroyska fullveldið hevur tín støðutakan verið røtt - at allar broytingar í stýrisskipanini skulu gerast innan fyri ríkisfelagsskapin - og eru vit 75-80% av limum floksins sum taka undir við hesum, og eru tær takksamir herfyri.

Formaður Tjóðveldisfloksins stríðist øgiligt fyri fullveldinum, hann er hugsjónarmaður, og hoyrir tað ungdóminum til at seta sær høg mát, hóast hesi ofta ikki kunnu røkkast.

Men hetta kann harafturímóti ikki sigast um ein annan fyrrverandi politikkara, Jógvan Sundstein, sum í Sosialinum 4. mai mælir til at kvetta beinanvegin og at gera tað óansæð, hvussu stutt skiftistíðin er. Ongin argumentatión fyri serkønum monnum og ørskapi í hesum rína við hendan mann og tá ið hansara politisku kvalifikatiónir óivað hava verið á sama støði í 80‘unum, har hann sat frammaliga í politikki, er tað ikki at undrast yvir, at allur búskapur her bleiv kollrendur. Við sínum úttalilsum sýnist tað, sum um hann ynskir okkum hesa somu lagnu einaferð enn. Ikki eru tað hugsjónir, men heldur undirlutakenslur, ið gartera í Jógvani Sundstein. Hetta skilja vit øll, sum sóu eina samsending Sjónvarp Føroya hevði við danskt sjónvarp fyri nøkrum árum síðani, har Kirstin Jacobsen fór við hesum manni, sum ein mamma tuktar ein óargaligan smádrong.

Kósin formaður Javnaðarfloksins leggur her, er tann rætta.

**Leif Nolsøe, Sørvágur**

# Stúgvandi full Dómkirkja

Tað er hon sum oftast, men í dag var nakað serligt.

Emma las inngangsbønina og neyvan hevur inngangsbønin vera biðin meira inniliga – hart og týðiligt – enn í dag.
Takk fyri góða Emma.

Hetta var ein vanlig gudstænasta, men tað, sum var øðrvísi, enn vanliga dagar, var at tað vóru menningartarnað, sum gjørdu tænastu saman við dómpróstinum.

Javni hevur skipað fyri einum mentunartiltaki seinasta vikuskifti – at gera tey menningartarnaðu meira sjónlig. Og sanniliga var hetta prikkurin yvir i-ið. Signað veri tit, ið hava lagt nógva orku í hetta tiltak.

»Tað, sum tit hava gjørt ímóti einum av mínum minstu, tað hava tit gjørt móti mær«.

Eg sigi fyri meg, at hetta var ein vælsignað løta í Havnar kirkju. Ikki minst tann løtan, tá Elin sang. Eitt var klárt, at tey bæði Jóannis, sum hevur klaverfylgispæli, hava sungið og spælt saman fyrr, tí so gott samspæl var teirra millum. Tann spontana gleðin sum var í sanginum nam hvørt einasta hjarta.

Stóra tøkk eiga tit fyri dámin, tit settu á gudstænastuna. Eivind las epistulin og Petur Jakku las evangeliið, takk fyri báðir tveir.

Útgangsbønina las Símun Petur, og hóast mikrofonin var flutt, so hoyrdu vit hansara sterku rødd – væl og virðiliga. Hesin dagur er ein perla, sum vit fara at minnast aftur á við miklari gleði og tøkk.

Tøkk til tykkara, sum tóku hetta stig og vælsignað veri tit sum gjørdu dagin til eitt varandi minni.

**Hanna Lisberg**



# Ongan hug at vera eygleiðarar

*Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava ongan huga at vera við til ríkisrættarligu samráðingarnar sum eygleiðarar, soleiðis sum Jenis av Rana úr Miðflokkinum skjýtur upp*



*Formenninir í Samabandsflokkinum og Javnaðarflokkinum halda tað vera nóg mikið at verða kunnaðir gjøgnum fjølmiðlarnar og utanlandsnevndina um samráðingarnar*
**Mynd: Føroyska Tíðndastovan**

JOHN JOHANNESSEN

Teir báðir stóru andstøðuflokkarnir hava ikki hug at vera eygleiðarar til næsta samráðingarfundin um ríkisrættarligu støðuna.

Hetta gera teir greitt, eftir at Jenis av Rana hevur skotið upp, at andstøðan í framtíðini skal vera við til samráðingarnar, sum eygleiðarar. Jenis av Rana fer fyrsta dagin at senda løgmanni bræv við umsókn um at geva andstøðuni eygleiðarastøðu.

**Dáma ikki hugskotið**
Formenninir í teimum báðum stóru andstøðuflokkunum, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, halda ikki, at tað fer at gagna andstøðuni at vera við til samráðingarnar. Teir eru báðir samdir um, at teir ikki høvdu kent seg væl saman við landsstýrinum við samráðingarborðið.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, heldur, at um andstøðan skal kunnast meira um, hvat gongur fyri seg undir samráðingarfundunum millum landsstýrið og donsku stjórnina, er tað landsstýrið, ið skal skal syrgja fyri, at andstøðan verður nóg væl kunnað gjøgnum uttanlandsnevndina.

– Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg hava fleiri ferðir lagt okkum undir at misnýta og mistulka ymiskt, ið skal vera farið fram undir samráðingunum, men eg haldi ikki, at støðan hevði verið betur, um vit vóru við inni í samráðingarhølunum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Edmund Joensen er samdur við Jóannesi Eidesgaard. Harafturat heldur hann, at tað ikki gevur nakra meining, at anstøðan situr og trónar framman fyri samráðingarborðið hjá donsku stjórnini og landsstýrinum, tá hon onga ávirkan sleppur at hava á, hvat gongur fyri seg.

– Eg eri bangin fyri, at tað kann virka øvugt, um vit eru við til samráðingarnar. Tá vit sita har, kann tað sýnast fyri dønum, sum andstøðan í Føroyum stuðlar landsstýrinum, og tað ger hon ikki, sigur Edmund Joensen.

Bæði Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen gera vart við, at spurningurin um eygleiðarastøðu ikki er viðgjørdur í flokkum teirra. Tí eru úsagnirnar teirra persónligu hugsanir. Men kortini vænta teir, at tær eisini eru umboðandi fyri flokkarnar.

**Forðar fyri misskiljingum**
Orsøkin til, at Jenis av Rana ynskir, at andstøðuflokkarnir skulu fáa eygleiðarastøðu undir restini av fullveldissamráðingunum er, at hann heldur hetta kann hava við sær, at tað slepst undan, at ymiskt, ið fer fram undir samráðingunum verður misskilt.

Jenis av Rana heldur tað ikki vera nakran trupulleika fyri landsstýrið, um andstøðan sleppur við til samráðingarnar. Hann vísir á, at landsstýrið sjálvt ger av, hvørjar ráðgevar tað hevur við til samráðingarnar, og tí kann tað eisini sjálvt gera av at hava andstøðuna við. Ætlanin er jú ikki, at andstøðan skal vera virkin í samráðingunum, vísir hann á. Tískil væntar hann, at andstøðan sleppur við til næsta samráðingarfundin, er hon sinnað til tess. Hetta ætlar hann sær at práta við Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin um sum skjótast.

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at landsstýrið ikki hevur viðgjørt spurningin, um møguleiki er fyri, at andstøðan kann vera við til samráðingarnar. Heldur ikki er greitt, um hetta í roynd og veru ber til.



# Stór øking í ferðafólkatalinum

*Higartil í ár hava knappliga tíggju prosent fleiri ferðafólk ferðast um flogvøllin í Vágum. Tað er kortini ikki bara ferðafólkatalið sum økist, tí so at siga á øllum økjum er vøkstur at síggja*

SVEINUR TRÓNDARSON

Virksemið á flogvøllinum í Vágum økist alsamt. Ferðafólkatalið er økt úr góðum 87 túsund ferðandi í 1993 til góð 129 túsund í 1999, og tað sær út til, at økingin bara heldur á.

Seinastu hagtølini frá Statens Luftfartsvæsen vísa nevniliga, at tað higartil í ár hava ferðast tíggju prosent fleiri ferðafólk um flogvøllin í Vágum, enn tað gjørdu fýra teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Torfinn Jacobsen, frá Statens Luftfartsvæsen, staðfestir gongdina og leggur afturat, at tað er vøkstur á øllum økjum.

- Ferðafólkatalið er økt munandi, men eisini talið av fráferðum/komum og farmi er økt, sigur hann.

Men hvør er orsøkin til hesa ógvusligu øking?

- Tíðirnar eru sjálvsagt munandi betri nú enn tær vóru fyri sjey árum síðani, men tað er ikki einasta orsøkin. Atlantsflog hevur nógv fleiri fráferðir og hevur eisini nógv fleiri ferðamál, og tað hevur, t. d. saman við eini møguligari oljuvinnu, sítt at siga, sigur Torfinn Jacobsen.

Eitt annað, sum sjálvandi spælir inn er, at flogfeløgini bæði lækkaðu prísirnar á ferðaseðlum í apríl mánaði. Her skal ein kortini hava tað í huga, at príslækkingin ikki kom í gildi fyrr enn allarseinast í apríl mánaði, og tí er avmarkað, hvussu stóra ávirkan hon hevur á ferðafólkatalið fyri apríl. Hinvegin kann so væntast, at príslækkingin fær stóra ávirkan á hagtølini fyri mai og juni mánað.

Best umtókta ferðamál føroyinga hevur altíð verið Danmark, men nú tykist, sum um Ísland eisini er við at manna seg upp í so máta, greiðir Torfinn frá. – Á tí farleiðini er ein stór øking farin fram, sigur Torfinn.

Um hækkingin fer at halda torir Torfinn Jacobsen ikki at meta um. Hann sigur, at hann hevur trupult at gita sær, at ferðafólkatalið ár undan ári kann økjast við knappliga tíggju prosentum. - Men sum nú er, mugu vit staðfesta, at økingin er har, sigur hann.

team 85 · 31 65 11

**Shetland Cruise 2000 summarið**
www.smyril-line.fo
**SMYRIL LINE**
**Tel 34 59 00**

**Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag**



**Gisting á hotelli**
*úr einans ...* **864,-** fyri hvønn (í lágárstíð)



**Gisting á vallaraheimi**
*úr einans ...* **691,-** fyri hvønn (í lágárstíð)



**Privat gisting**
*úr einans ...* **819,-** fyri hvønn (í lágárstíð)

**Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30**

***Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu***

***Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.***



**Ring og hoyr nærri !**

**e-mail: booking@smyril-line.fo**